# Hvussu stýrdu Føroyar gjøgnum Covid-19 kreppuna?

## Viðmerking til eftirmetingina hjá Løgmansskrivstovuni

Eftirmetingin byrjar við staðfestingini at ”*Covid-19 kreppan er mest umfatandi heilsukreppa, sum heimurin hevur sæð í nógv ættarlið. Kreppan var fleirdimensjónell, torskild, broyttist ofta og kravdi sostatt sera nógv av stýrandi myndugleikum*”, - og settur verður spurningurin: ”*hvat hava vit lært, og hvat kann gerast betur eina aðra ferð?*”

Hvørt verandi eftirmetingin, er endaliga frágreiðingin, ella partur av einari størri lýsing av ”Covid-19 kreppuni”, er ilt at meta um, tá alt átakið er stýrt við óviriligari ”deyða tøgn”!

**Heilsuverkið sum flugtbilistur**
Høvuðsorsøkin til ”Covid-19 kreppuna”, er sambært fremstu serfrøðina Luc Montagnier og Geert Vanden Bossche, at tey sum tóku á seg ábyrgdina at stýra hesari, ikki høvdu neyðuga førleikan! Heldur enn at søkja sær neyðuga vitan, hava tey, eins og bilførarin, sum ongantíð sýnist hava skilt ferðsluljós, valt at koyra tá ferðsluljósið lýsir reytt. Tó alt fleiri taka skaða og doyggja á kross-vegnum, velur bilførarin, av berum stórlæti, at halda áfram, og heldur flyggja frá staðnum.

Hví bilførarin ikki hevur kunnleika til nakað so grundleggjandi sum ferðsluljós, er undrunarvert, og ikki minni, at eingin við ábyrgd, steðgar skilaleysu koyringini! Enn meira hugstoytt er tó, at eingin tekur hond um tey skaddu-, og avvarðandi til tey deyðu, á krossvegnum! Grundgevingin er, at einki samband er millum skilaleysu koyringina og óhappini, tá óhapp eisini kunnu koma fyri, lýsir ferðsluljósið grønt!

Er tað so, at einki samband er millum skilaleysu koyringina og óhappini, so er bráðneyðugt at fynna veruligu orsøkina, og fáa sløkt ferðsluljósið, til hendan er funnin. Men heldur ikki tað verður framt, enn minni viðgjørt! Undrunarvert og ræðandi er væl niðurstøðan!
*Heilsuverkið sum flugtbilistur”, við Professara, Global Health, Christine Stabell Benn*

**Luc Montagnier og Covid-19 kreppan,** - *við atliti til vanliga koppseting!*
”*Tað er ikki til at skilja, at tað verður koppsett undir einari alheimsfarsótt. EPIDEMILOGAR VITA AT TAÐ GERT TÚ IKKI! Søgubøkurnar koma at lýsa ógvusliga mistakið! Talan er um eitt vísindaligt mistak, eitt medicinskt mistak, eitt mistak sum ikki kan góðtakast! Koppsetingin mennir nýggj virusfrábrygdi sum hava ment mótstøðuføri ímóti koppingarevninum. Vit síggja tað í øllum londum har koppset verður, at kurvarnar fyri koppseting og deyða fylgjast!*”

**Geert Vanden Bossche og Covid-19 kreppan** - *við atliti til vanliga koppseting!*
*”Til ber ikki at goyma burtur vísindi, sum náttúran, ørvill, ynskir at leggja á blik. Samfeløg, har fjøldin er koppsett, verða tikin á bóli. Einki var einfaldari at spáa um, enn skaðan sum vildi standast av at framd varð Covid-19 hópkoppseting undir einari alheimsfarsótt. Fávitska og stórlæti hjá teimum sum stillaðu seg fremst at mynda almannahugsanina, og við teimum, tey sum skuldu taka avgerðir á økinum, eru høvuðsorsøkin til hetta risastóra mistak. Felagsskapir, stovnar og ídnaður, við manglandi vitan um hetta sera torgreidda øki, hava broytt eina natúrliga virala farsótt til eina vanlukkuliga immunflýggjan!” (Sí greinina ”Stilli áðrenn ódn” - hvat er í væntu!)*

**Hví rakti kreppan ikki allastaðir?**
Er stórlætið framvegis so stórt, at Heilsuverkið ikki ynskir at heinta hjálp frá fremstu serfrøðini á økinum, sum hevur greiða svarið til orsøkina til Covid-19 kreppuna í Føroyum, so ber til at venda sær til økir í heiminum, har als eingin kreppa hevur verið, og stilla einfalda spurningin, *”Hvussu ber tað nú til?” - og hesi fáa ikki vitjan av einari komandi ódn, sambært GVB!*
Løgmansskrivstovan kann taka samband við Uttar Pradesh (240 mill íbúgvar), og fáa svarið, sum vónandi verður leitað eftir: https://rumble.com/vrob15-uttar-pradesh-covid-free.html

**Hevur fyrsti læknin sett hol á okkara Covid-19 svull? -** *betur seint enn ongantíð, tó GVB sigur klokkuna vera farna av 12!*

Hanus á Lógv, kommunulækni: *”Eg havi illgruna um, at Koronavaccinatiónirnar koma at vísa seg at vera ein av størstu mistøkum í læknavísindaligu søguni nakrantíð!”*

Dr. John Campbell – MP Andrew Bridgen - Vaccination problems, UK Parliament
https://www.youtube.com/watch?v=JvSHD_n3Lyg




Dr. John Campbell – Sir Christopher Chope, UK Parliament
https://www.youtube.com/watch?v=P_uUb6WM6bI



Skelkandi myndir úr UK parlamentinum, har fólkavaldir politikarir loypa á dyr, tá veruleikin verður lagdu á blik fyri teimum. Tó eru politikarir sum taka uppgávu sína í álvara, og tosa søk teirra skaddu.

Var myndin tikin úr løgtinginum, har deyða tøgn hevur valdað í tvey ár, tá var væl salurin tómur! Hvørt tað er líkagleði ella skommin, at so er, er ilt at meta um, úrslitið fyri tann skadda, og øll tey koppsettu, sum hava tørv á at verða útgreinað, gerst tó tann sama.

Ábyrgdina av sorgarleikinum eigur politiska skipanin og Heilsuverkið, sum í blindum hevur framt eitt royndarátak, ongantíð roynt áður, á eina heila tjóð, við einari eksperimentiellari mRNA ílegu-viðgerð, ov vandamikil til djór, lýst sum koppsetin, har eingin dugur at meta um avleiðingarnar!

***Til ber ikki við orðum at lýsa illgerðina!***

*Mourits M. Joensen - Tórshavn 28.03.2023*